## 18 ár fyri at brúka sól

Stráluverndarmyndugleikarnir í Noregi, Svøríki, Finnlandi og Íslandi mæla nú tí politiska myndugleikanum til at áseta, at fólk skulu hava fylt 18 ár, áðrenn tey kunnu leggja seg í eina sólsong. Sagt verður, at ultraviolettar strálur økja vandan fyri húðkrabba munandi, og at vandin er serliga stórur hjá børnum og ungum. Tí mæla stráluverndarmyndu gleikarnir politikarunum til at seta 18 ára aldursmark fyri at brúka solarium. Víst verður á, at tilsvarandi reglur eru longu galdandi í fleiri øðrum evropeiskum londum, skrivar norska tíðindastovan ANB.



## Loynilig fangatyppi í Kina

Kinesisku myndugleikarnir hava fleiri loyniligar fangaklivar, har fólk kunnu sita innistongd í fleiri mánaðir. Tað stendur í einari nýggjari frágreiðing, sum mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch hevur skrivað, og sum BBC endurgevur. Sagt verður, at teir flestu klivarnir eru á sjúkrahúsum ella hotellum, sum tað almenna eigur í Beijing. Human Rights Watch sigur, at klivarnir verða ofta brúktir sum varðhald til fólk, sum koma av bygd til Beijing at mótmæla avgerðum hjá myndugleikunum. Tey fáa einki at vita, og tað, sum tey hava uppi á sær, verður tikið frá teimum, sigur felagsskapurin.

# lokkurin gonguni



*John Johannesen vil ikki siga so nógv um stevið í samgonguni, men staðfestir, at fíggjarlógin avger viljan hjá Javnaðarflokkinum*

at Javnaðarflokkurin vil seta bæði rættartrygd og EFTA tilgongd í vanda fyri at fáa tað at síggja út sum, at øll onnur eru eftir heilsuverki og almannaverkið.

Tað hevur nakað at siga í EFTA tilgongdini, hvussu nógv málsøki eru yvirtikin.

Hetta heldur John Johannesen vera eina sera ógvusliga viðmerking, tí skal mann geva revsirættinum nakað innihald, so kostar tað meira enn nakrar hundraðtúsund krónur.

– Tað ber ikki til, at flokkurin skal profilera seg við hvørjum einasta spurningi, og skal hetta vera lagið, tá vil mann ikki vera í samgongu við nøkrum. Tí tað má vera avmarkað, hvørjum mann hóttir og provokerar við, sigur Poul Michelsen.

Javnaðartingmaðurin fegnast hinvegin, at Javnaðarflokkurin ger meira burturúr sær.

– Eg fegnist um, at Javnaðarflokkurin er farin at virka aftur, og samgongan er millum tríggjar flokkar, sum allir mugu finna útav at gera tær semjurnar, sum eru neyðugar, sigur John Johannesen.

### Føra valstríð

Poul Michelsen metir somuleiðis, at Javnaðarflokkurin nýtir hvønn einasta møguleika at føra valstríð, tí yvirtøkurnar, sum vóru umtalaðar á tingi í gjár, eru festar í samgonguskjalinum, sum Javnaðarflokkurin hevur skrivað undir uppá.

– Tað er ótrúligt, at teir kunnu skifta soleiðis, tí teir líka skulu hjálpa uppá eitt eventuelt valstríð, heldur Poul Michelsen.

John Johannesen heldur hinvegin, at tað eru fleiri onnur mál, sum eru nevnd í samgonguskjalinum, sum ikki vera gjøgnumførd, umframt, at hann ikki heldur, at málið er lýst nóg væl.

Men Fólkaflokstingmaðurin heldur tó, at tað ber til at bjarga samgonguni, hóast hann heldur vónina vera lítla.

– Eg gevi ongari samgongu mønustingin, men tað er tekin um at Javnaðarflokkurin vil sleppa burturúr, sigur hann, og vísir aftur á, at hann heldur, at Javnaðarflokkurin bara koyrir upp á populismu í løtuni, og enntá roynir at fáa ein fíggjarlóg ígjøgnum saman við andstøðuni heldur enn við samgonguni.

Politiski leiðarin í Javnaðarflokkinum heldur hinvegin uppá, at tað hevði verið skilaleyst at føra valstríð.

– Eg kenni ikki til nakað valstríð, og tað hevði verið beinleiðis ábyrgdarleyst at havt val nú, tí samfelagið tolir ikki slíkan óstabilitet, sigur John Johannesen.

## Edmund ynskir fólkaatkvøðu um vallóg

**Um formansskapurin í Løgtinginum kemur við einum uppskoti um, at Føroyar skulu venda aftur til skipanina við fleiri valdømum, so vil Edmund Joensen skjóta upp fyri Løgtinginum, at føroyingar fáa málið til fólkaatkvøðu**

Edmund Joensen, sum fyri tveimum árum legði uppskot fram at gera Føroyar til eitt valdømi, og í skundi fekk tingið at samtykkja, heldur hann, at fólkið skal avgera, hvussu valskipanin skal skipast.

- Eg kann ikki ímynda mær, at ein meiriluti í Løgtinginum fer at nokta føroyingum møguleikan at siga sína hugsan um sína egnu valskipan, sigur Edmund Joensen í skrivi, nú verandi formansskapur arbeiðir við at endurskoða vallógina.

Hóast Edmund Joensen ikki spurdi fólkið, tá hann saman við meginpartinum av tinginum, gjørdi Føroyar til eitt valdømi, so vil hann hava fólkaatkvøðu, um hetta aftur skal broytast.

### Óseriøsur formansskapur

Edmund Joensen metir tað vera óseriøst av formansskapinum at koma við einum slíkum uppskoti nú.

- Bert tvey ár eru liðin, síðani Løgtingið setti skipanina við einum valdømi í verk, og tað er alt ov tíðliga at fara til eina aðra skipan longu nú. Verandi skipan má fáa loyvi til at virka nøkur løgtingsval, so vit veruliga kunnu síggja fleiri góð árin av henni. Ikki fyrr enn tá ber til at endurskoða hesa skipanina á einum góðum grundarlag, sigur Edmund Joensen.

### Grundgevingarnar halda

Edmund Joensen hevði nøkur høvuðsargument fyri at seta skipanina við einum valdømi í verk.

Meira enn 80 prosent av føroyingum búgva í einum samanbundnum øki, kvinnuliga umboðanin í Tinginum skuldi økjast, demokratiska undirskotið, har summi ikki kunnu velja allar uppstillaðar flokkar, mátti burtur, Valúrslit við óræ‍ttvísum tingmannatali máttu burtur, meira landspolitikkur mátti inn í myndina og gamla valskipanin var leivd frá fortíðini.

- Hesi argumentini eru framvegis góð og galdandi, og tað talar fyri, at Føroyar eiga at halda fast um verandi skipan við einum valdømi fyri øll, skrivar Edmund Joensen, hóast hann eisini í miðlunum hevur sagt, at tað ikki var høvuðsætlanin at skipa fyri at tað bleiv minni lokalpolitikkur.

- Lat føroyingin avgera sína egnu valskipan – ikki politikarar, ið vilja venda aftur til eina skipan, ið elvir til lokalpolitik, demokratiskt undirskot og verri kvinnuliga umboðan, sum hoyrir einari farnari tíð til, sigur Edmund Joensen í skrivi í dag.

-eij